## ... um FC Barcelona

Eg síggji so nógvar dystir hjá FC Barcelona, sum tað ber til at síggja. Eg var púra burtur í dreymaliðnum hjá Johan Cruyff, sum leikti árini 1989-1994. Tá Guardiola, Sergi, Michael Laudrup, Stoichkov, Romario, Koeman, Nadal, og aðrir framúrskarandi tekniskir leikarar undirhildu allan heimin. Eg havi enntá kalla ein av mínum hundum "Barca".




## ... um kvinnulandsliðið

Kvinnulandsliðið verður ikki nóg nógv virt. Tað virkar sum FSF hevur eitt kvinnulandslið, fyri at kunna vísa á, at Føroyar hava eitt kvinnulandslið. Hevði FSF sloppið undan, høvdu teir óivað droppað kvinnulandsliðið. Tó haldi eg, at úrslitini hjá kvinnulandsliðnum eru heilt góð. Og ein hómar ein glotta við yngru landsliðunum.

# langt burtur!




*Ársins venjari hjá kvinnunum saman við lítlu dóttrini, Ragnhild*

## Fakta

Navn: Allan Dybczak
Bústaður: Kovalág 5 í Tórshavn
Barn: Ragnhild, skjótt 2 ár
Starv: HF-lesandi og fótbóltsvenjari
Felag: B36

### Ungalingarnir fyrsta liðið

Árini gingu, og hann og vinmennirnir høvdu valt at spæla hugnafótbólt á við Fram í 4. deild. Ein dagin hann og vinmennirnir stuttleika sær í Gundadali rópar ein kend rødd á hann. Tað er Jacob Thomsen, sum var lærari í Kommunuskúlanum hjá Allani, í Ítrótti, fysik og støddfrøði. "Vit mangla venjarar í B36. Hevði tað verið nakað fyri teg?" spurdi sumbingurin beint fram. Allan tók av. Fyrsta liðið hann vandi vóru unglingarnir hjá B36. Teir vóru bara 6, sum vóru møttir fyrsta kvøldið Allan var venjari, men tá fór Allan at ringja runt fyri at fáa teir ungu til venjingarnar aftur. Tað eydnaðist at fáa ein rættuliga stóran hóp, og spæligleðin kom aftur í hópin. Liðið vann seg ikki víðari til endaumfarið, men vann á sær sjálvum. Allan hevði fingið blóð á tonna. Honum dámdi væl felagslívið, og vandi hann unglingarnar tvey tey fyrstu árini. Við árunum fekk hann meiri og meir at gera í B36, og hevur hann havt upp í 4 venjarastørv í B36, í einum kappingarári. Tað eina árið vandi hann bæði piltar B, smádreingir A, unglingar, umframt at verða yvirskipaður ungdómsvenjari í felagnum. Í 2007 hevur Allan vant bæði 1. Deild kvinnur, gentur 14-17 ár og unglingar. Allan vandi eisini greipuvinnarnar í dreingjadeildini, í 2005. Summir av hesum leikarum eru partur av Formulahópinum hjá B36 í dag. Her kunnu nevnast Jóan Pauli Jacobsen, Rúnar í Lon Jacobsen, Christian í Garði og Jóhan Ellingsgaard, sum Allan vónar at síggja aftur í B36, aftaná at hesin hevur verið úti á Argjum og leikt!

### Gott við venjara í tvey ár

Allan fegnast um, at leiðslan í B36 hevur sett nýggja venjaran hjá Formulaliðnum; Heðin Askham fyri tvey ár. "Tá teir fyrr hava sett ein venjara fyri bara eitt ár. Hava teir signalerað, at teir satsa stuttskygt, og hugsa bara um tað árið!" sigur Allan avgjørdur, sum heldur tað verða ógvuliga stuttskygt bara at undirskriva eitt-ára sáttmálar. Allan vónar eisini, at fleiri av teimum ungu upprunaligu B36-leikarunum koma at mynda Formulahópin í framtíðini. Sjálvur er Allan ógvuliga avgjørdur um, at hann fer bara at venja eitt lið um árið í framtíðini: "Eg vil leggja alla mína orku í at venja eitt lið optimalt!". Sjálvt um hann er ársins venjari í kvinnudeildini følir Allan, at hann hevði verið ein enn betri venjari, um hann hevði kunnað konsentrerað seg 100% um B36-kvinnurnar! Sjálvur hevur hann tó ikki endaliga avgreitt síni viðurskifti við B36. Hann vónar at verða partur av venjaratoyminum hjá B36 í 2008. Men enn eru ikki allir brikkarnir falnir uppá pláss.

### Verið sjómaður

Yrkisleiðin hjá Allani hevur verið annað enn bara fótbóltur. Beint nú stríðist hann við HF á øðrum ári. Tá HF er liðugt fer hann antin á pedagogskúla úti á Frælsinum, ella fer hann niður at lesa. Hetta tekur hann støðu til um jólini. Allan varð sjómaður á yngri árum. Hann var við Vestmenningi í 1 ½ ár, og var 5 mánaðir undir Ný Fundlandi við Borðoyarnes. Allan hevur eisini arbeitt, sum netumsitari á Fiskirannsóknarstovuni. Allan hevur tó eitt sterkt ynski um at fáa UEFA-A venjaralisens. Hann hevur UEFA-B-venjaralisens, sum er. Men skal Allan fáa UEFA- A-lisensin innanborða krevur tað, at hann venur eitt vaksnamannalið, ella eitt av teimum eldru ungdómsliðunum. Og hann vónar til tað síðsta, at tað verður í B36!